FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

**Leiðslufundur 14. juni 2016**

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Til staðar á fundinum vóru:<br><br>Avboð: | Sigurð í Jákupsstovu (SíJ), Turið Sigurðardóttir (TS), Hans Andrias Sølvará (HAS) og Jørgen Meitilberg (JM)<br><br>Hans Pauli Joensen (HPS) |
| Skrivað hevur: | JM |
| Fundartíð: | týsdagur, 14. juni 2016 |
| Fundarstaður: | Setursskrivstovan |

**Mál til støðutakan:**

**Mál til umrøðu:**

## 1. Javnstøða í mun til upptøku

Á sjúkrarøktarfrøði, lærara og námsfrøðiútbúgvingini er ein sera stórur meiriluti av umsøkjarunum kvinnur, við tí úrsliti, at tað onkur ár bert er ein ella tveir menn sum byrja lestur á hesum útbúgvingum. Hetta er sjálvandi rættiliga óheppið, tí hevur leiðslan sent javnstøðunevndini fyrispurning, um tað ber til at taka atlit til kyn í sambandi við upptøkuna.

Niðurstøðan frá Javnstøðunevndini er, at nevndin ikki kann loyva hesum, av tí hon ikki metir tað vera rímiligt at broyta upptøkutreytirnar inni í sjálvari umsóknartilgongdini. Tá útbúgvingarplássini vórður lýst leys at søkja, varð ikki upplýst, at kynskvotering kundi vera galdandi í ávísum førum.

Um setrið ynskir at kynskvotera á eini ella fleiri útbúgvingum, eigur hetta at verða gjørt tá útbúgvingarnar verða lýstar leysar at søkja. Men eftirsum talan er um ein sera prinsipiellan spurning, má Javnstøðunevndin søkjast um undantaksloyvi fyrst.

Niðurstøðuna frá javnstøðunevndini verður tikin upp á einum leiðslufundi í heyst, soleiðis at avgerð um kynkvotering verður tikin í góðari tíð, áðrenn útbúgvingarnar verða marknaðarførdar.

## 2. Notat um arbeiðstíð hjá vísindastarvsfólkum á Fróðskaparsetri Føroya

Útkast til arbeiðssetning til arbeiðsbólk, sum skal orða ársnorm fyri vísindafólk, varð umrøtt og góðkent. Rektarin arbeiðir víðari við málinum.

Næsta stig er at kunna starvsfólk á Setrinum um arbeiðsbólk og arbeiðssetning. Síðani verða fastir arbeiðsfundir lagdir.

## 3. Frágreiðing frá kampusbólki Fróðskaparsetur Føroya

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

Útkast til frágreiðing til landsstýriskvinnuna í mentamálum varð umrøtt. Frágreiðingin verður send Mentamálaráðnum í juni mánað.

Dekanarnir senda viðmerkingar til frágreiðingina skjótast gjørligt.

**Kunningarmál:**

**Ymiskt:**